# Clickhaze við EP, Eivør og Petur




**Í gjár kom leingi væntaða fløgan við Clickhaze, sum vann Prix Føroyar og harvið tryggjaði sær uppihald í donskum upptøkuhølum. Talan er um eina EP við seks løgum og Sosialurin slapp at lurta, áðrenn útgávudagin**

TÓNLEIKAUMRØÐA
*Dagfinn Olsen*

Í gjár kom út fløga við einum hinum fremsta - og samstundis mest sermerkta - bólkinum í Føroyum.

Clickhaze vann sær sum Prix Føroyar vinnari pláss í Lundgaard Studios við Dave Hyatt handan knøttarnar. Leingi hevur tí verið bíðað eftir eini útgávu.

Og burturúr ferðini í upptøkuhølunum í Danmark komu 3 løg. 3 løg eru live upptøkur frá Prix Føroyar kappingini. Sosialurin hevur lurtað skjótt ígjøgnum fløguna áðrenn útgávudagin.

Byrjað verður við Daylight. Ein tung trummubyrjan leggur botn í og letur upp. Altjóða damúr er yvir lagnum, har Petur sleppur framat við sínum rappi/tosi og teski, ið hóskar. Eitt gott lag og Eivør lyftir upp í hæddirnar.

Skirvin Flá. Kingo. Petur letur upp og Eivør førir okkum longur. Gott lag, eisini í tyngra enda.

Sorrig och Gledje. Kingo. Nú eru tey norðuri í Vík serfrøðingar í Kingo. Men neyvan hevði nakar annar tónleikabólkur gjørt Clickhaze hetta roysni eftir. At føra gamlt í nýggjan búna - Kingo til nútíðarrock. Ein frálík tulking, sum kemur at standa sum ein varði.

Seinnu 3 løgini kenna vit frá Prix kappingini, Frozen Lullaby, Notes fram the Underground og so frálíka og vælkenda Indigo Brow, sum óivað ljómaði í oyrunum á mongum eftir prix finaluna.

## Heild

Mong høvdu helst hugsað sær eina heila fløgu við Clickhaze, men ein EP er ikki at blaka aftur. Tí talan er um bólk, ið hevur dygd. Har er góðs í og ein merkir, at bólkurin er gjøgnumførdur. Tað sama kann sigast um tónleikin.

Lat okkum minnast, at talan er um stak dygdargóðan bólk, tónleikarar, við Føroya mest karismatiska sangara eins væl og Føroya bestu sangarinnu.

Hetta er ikki bara eitt hendaga verk. Her er alt lagt í. Ein heild er komin burturúr og tað er ikki so ofta, at førosykir fløgukeyparar uppliva tað.

At lurta eftir - ella uppliva Clickhaze, er sum at koma í annan heim. Okey, talan er um ein heldur døkkan heim, men upplivilsi er tó positivt. Fatanin og útrykki er so sterkt, at ein verður tikin við inn í heimin, har seini sløgini og ofta døkku tónarnir sveiggja sum tari í logn.

Eitt heildarverk er komið burturúr. Og annað var kanska ikki væntandi frá Clickhaze, sum jú tykist gjøgnumført allan vegin.

Tillukku við tí, Clickhaze!

## Til Danmarkar

Upptøkur eru gjørdar í Lundgaard Studios, í Jac-Zak, har Niclas Johannesen við pultin og í Norðurlandahúsinum við Finni Hansen við knøttarnar. Óli Poulsen ljóðblandaði.

Til ber eisini at hyggja inn á síðuna www.clickhaze.net

Í summar skal Clickhaze til Danmarkar at leika á festivalum. Og fløgan boðar frá góðum og kanska Clickhaze ger danska summarið enn betur.

Fløgan ger í hvussu er ikki føroyska summarið verri.

# Summartónar 2002 byrja mánadagin



*Summartónar byrja mánadagin. Føroyski bólkurin Aldubáran fer at framføra, eins og mong vitjandi uttan úr heimi framføra kring landið*

**Í tíggju ár hevur tónleikafagnaðurin Summartónar nú verið fastur summargestur í Føroyum. Kring landi eru konsertir og hol verður sett á ljómin mánadagin. Á skránni eru bæði føroysk og útlendsk tónlistaverk og tónleikarar**

TÓNLEIKUR
*Dagfinn Olsen*

Mánadagin verður hol sett á Suumartónar 2002. Síðani 1992 hava Kristian Blak og onnur skipað fyri hesum tónleikafagnaði, ið er okkara klassiski tónleikafagnaður. Føroyskir tónleikarar leika og vitjandi tónleikarar uttan úr heimi koma til Føroya at leika.

Á skránni eru altíð mong ymisk verk, eisini føroysk. Og vanliga eru eisini nýggj føroysk verk á skránni, ið verða leikt og frumframførd av bæði føroyskum, eins væl og útlendskum tónleikarum.

Hetta er eitt vindeyga úteftir, har føroyingar vísa, hvat føroysk tónaskøld fáast við. Og eisini kemur eitt lot inn og gevur íblástur.

Annað sermerkt við Summartónum er, at ikki alt gongur fyri seg í miðstaðarøkinum. Kring landið verður spælt og óivað fegnast mong um hetta. Spælt verður í ár í Mykinesi, Suðuroynni, Hesti, Norðuroyggjum og á meginoyggjunum.

Summartónar byrja nú mánadagin tann 17. juni og halda fram í 4 vikur. Tó eru flestu konsertirnar fyrstu vikuna. Tær væl umtóktu helliskonsertirnar byrjaðu tó longu í maj og halda fram til á ólavsøku.

## Tey leikandi

Les Percussions Claviers de Lyon úr Frakland er stovnaður í 1983. Bólkurin troytir til fullnar keyboard og slagverkstónleik. Høvuðsljóðførini eru vibrafon, marimba, bassmarimba, sylofon og klokkuspæl.

DuoDenum er stovnað í 1992 við tí fyri eyga at spæla nýggjan klassiskan tónleik, sum er skrivaður fyri saxofon og slagverk.

Albin Brass er stovnað í London fyri tveimum árum síðani. Limirnir hava gingið á Royal Academy of Music í London. Føroyingurin Andras Olsen spælir trombom í bólkinum, sum spælir fjølbroyttan tónleik. Liminir eru úr Svøríki, Argentina, Onglandi og Føroyum.

Tórshavnar Manskór er sett á stovn í 1985 og telur í løtuni 26 sangarar. Hans Pauli Tórgarð stjórnar kórinum. Kórið syngur fjølbroytt úrval og føroyskur tónleikur, yngri og eldri, er vanligur partur av sangskránni.

Vefsn Ensemblet, stovnað í 1991, er yrkistónleikabólkur úr Mosjøen í Noreg. Bólkurin er settur saman av kendum sololeikarum og kamartónleikarum. Bólkurin hevur frumframført eitt ótal av verkum. Bólkurin hevur verið stigtakari til fleiri stórar verkætlanir.

Aldubáruna kenna føroyingar flestir. Bólkurin er stovnaður í 1995 av føroyskum tónleikarum í Føroyum og uttanlands. Føroyskur tónleikur er nærum altíð á skránni og bólkurin hevur bílagt og frumframført verk hjá føroyskum tónasmiðum bæði heima og úti.

Mad Cow Sing er sjeymannabólkur, ið er torførur at bólka. Tónleikurin verður lýstur sum ein kanningarferð við opnum sinni á marknaøkinum millum klassiskan tónleik, rútmiskan tónleik og jazz. Kendi Benjamin Koppel stovnaði bólkin í 1996. Bólkurin spælir bert tann 30. juli sum liður í konsertrøðini sunnudagar við Gjógv

Atli Ellendersen og Sune Vejlby Brogård. Atli er úr Fuglafirði. Hann leikar violin. Hevur leikt í Danmark og Svøríki. Hann hevur búð í Brasilia síðani 1989, har hann hevur spælt við Blumenau Kamarorkestrinum og Auracaria Kvartettini. Hann hevur seinnu árini verið listarligur leiðari hjá Curitiba Kamarorkestrinum. Sune V. Brogård er dani og leikar klaver. Hann hevur fleiri ferðir framført saman við Atla í Føroyum.

Mpiri er lítið føroyskt kamarkór, sum heldur til í Keypmannahavn. Bólkurin leggur seg eftir at framføra nýggjan føroyskan kórtónleik. Bíløgd eru verk eftir fleiri føroysk tónaskøld, serliga Trónd Bogason, Paula í Sandagerði og Kára bæk.

Hljómleyki er kamarkór, stovnað í 1974. Kórið telist millum bestu kór í Íslandi og leggur dent á nýggjari íslendskan tónleik. Íverksetur minst eitt stórt verk árliga. Bernharður Wilkinson stjórnar. Hann stjórnar eisini Íslands Symfoniorkestri og leikar í Reykjavík Wind Quartet, sum hevur vunnið altjóða viðurkenning og hevur vitjað í Føroyum. Bernharður Wilkinson stjórnaði eisini, tá fyrsta føroyska symfoniin, sum Sunleif Rasmussen skrivaði, varð framførd.

Á listastevnuni verða spæld verk eftir mong tónaskøld, Sunleif Rasmussen, sum júst hevur fingið tónleikavirðisløn Norðurlandaráðsins, Bjarni Restorff, Kristian Blak, Pauli í Sandagerði, Atli K. Petersen, Tróndur Bogason, Kári Bæk, Edvard Nyholm Debes, Hsueh-Yung Shen.

Snotuligur bóklingur við skrá og øðrum upplýsingum er gjørdur, sum vanligt er, so har ber til at ogna sær kunnleika um tiltøkini, sum annars eisini verða lýst nærri, áðrenn framførslu.

Føroyska summarið er byrjað og summartónar ljóma í bygd og býi.



*Aftara rað: Absalon Djurhuus, Johan Hendrik W. Poulsen, Jákup Dahl-Olsen, Einar Kalsberg, Petur Martin Rasmussen, Joen H. Andreassen og Tormóður Djurhuus. Fremra rað: Jákup Bærentsen, Jens Pauli Heinesen, Thomas Nygaard, lærari, Margretha Balle (f. Mohr), Steingrim Weihe og Andrias Reinert*



# Studentar frá 1952 hittast aftur

**Leygardagin hittast á Eiði til fimtiárahald teir studentar, ið fingu prógv á VBV í 1952. Av 12 eru 11 á lívi. Og eisini ein lærari, Erik petersen, livir enn. Samanhaldið er gott og hevur verið tað øll árini og flokkurin hevur verið saman fleiri ferðir at halda rundar dagar**

STUDENTAR
*Dagfinn Olsen*

Mangur góður maður, sum nú er komin upp í árini, sigur seg við gleði minnast aftur á skúlatíðina á VBV, har Føroya Studenta - og Preliminerskeið byrjaði í 1937. Ikki var so vanligt tá, sum, nú, at søkja sær hægri útbúgving. Men tann 22. juni hittast norðuri á Eiði tey, sum tóku studentsprógv í 1952.

Hyggur ein at hesum flokki, so sæst, at mong av hesum hava verið við til at mynda føroyska samfelagið og samfelagskjakið tey farnu mongu árini. Og summi eru við enn.

- Ja, árgangurin 1952 var kanska ikki so galin, skemtar ein av stigtakarunum til veitsluhaldið tann 22. juni, Tormóður Djurhuus, tá komið verður inn á prátið um tey, sum gingu á VBV.

## Minnast aftur á við gleði

Tormóður Djurhuus sigur, at minst verður aftur á tíðina á VBV við gleði, tí næmingar og lærarar vóru nærlagdir.

- Næmingar komu úr øllum landinum. Úr Runavík, Skopun, Vestmanna, Sandavági, Klaksvík, úr Havn og av Skála, Strondum og av Sundi. Og vit vórðu væl saman sjóvaði og hava hitst mangan tey mongu farnu árini, sigur Tormóður Djurhuus.

Og tað er einki at taka seg aftur í, at flokkurin frá 1952 hevur hildið sambandið. Til 20 ára haldið hittist flokkurin við hjúnafeløgum til veitsluhald í Kirkjubø, til 25 ára haldið á Viðareiði, til 40 ára haldið í Bø og nú til 50 ára haldið verður veitslan við hjúnafeløgum á Eiði.

Av teimum 12, ið tóku prógv, eru 11 enn á lívi og Tormóður væntar, at tey øll koma við tann 22. juni. Tá flokkurin fyri stuttum hittist til myndatøku, var eisini ein lærari teirra við, nevniliga Erik Petersen, sum nú er 91 ára gamal. Hann er einasti eftir á lívi av lærarunum á VBV tá. Erik Petersen var eisini lærari, tá Føroya Studenta - og Preliminerskeið byrjaði í 1937.

- Tað bleiv sagt úti á VBV. Bygningurin nevndist so. Tað lá við Skansavegin. Staðið er sprongt burtur nú. Í fríkorterunum, tá tosast ella filosoferast skuldi, so varð spákað um brúnna, ið gekk yvir á Skansan, minnist Tormóður Djurhuus, sum við spenningi og fragd bíðar eftir tí 22.juni, tá hann aftur skal hitta floksfelagarnar frá 1952.



*Aftara rað: Absalon Djurhuus, Johan Hendrik W. Poulsen, Jákup Dahl-Olsen, Petur Martin Rasmussen, Joen H. Andreassen og Tormóður Djurhuus. Fremra rað: Jens Pauli Heinesen, Erik Petersen, lærari, Margretha Balle (f. Mohr), Steingrim Weihe og Andrias Reinert*

# Kunna um at fáa jødar aftur til Ísrael

**Hetta vikuskiftið vitjar ortodoksi jødin, Eliezer Braun aftur í Føroyum**

SAMKOMUR
*Tíðindaskriv*

Saman við honum eru hjálparmaður hansara í Noregi, Hjalmar Svennevik, og kendi danski prædikumaðurin, Moses Hansen.

Ferðin er, eins og seinast, at kunna um arbeiðið at fáa jødar heimaftur til Ísrael. Felagið "Shuva Ísrael", sum Eliezer Braun umboðar, er stovnað fyri at útvega pening og aðra hjálp, í samband við projekt í Samaria, har búpláss verða bygd til heimkomandi jødar.

Á ferðini fara bæði Eliezer Braun og Moses Hansen at siga frá støðuni í Miðeystri. Eliezer Braun kennir sviðan av terrorismu dagliga, og Moses Hansen hevur nýliga vitjað Ísrael og hevur vitjað fleiri pláss, har ferðafólk annars ikki fáa loyvi av vitja, av trygdarávum.

Ferðalagið vitjar fylgjandi samkomur:
Sunnumorgun kl. 11.00 Lívsins Orð í Runavík
Sunnukvøld kl. 18.00 Betania í Skopun
Mánakvøld kl. 20.00 Keldan í Skálabotni og
Týskvøldið kl. 20.00 Soli Deo Gloria í Klaksvík.

Shuva Ísrael hevur upprætta eina føroyadeild, og føroyingar, ið ynskja at stuðla heimkomu jødanna, kunnu ringja á tlf. 314828. Girokontonr. hjá Shuva Ísraelføroyar er 202061.